## Sjónvarpið bar skeiv tíðindi




*Bjarni Djurholm langaði ikki bara út eftir Búskaparráðnum á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum. Sjónvarp Føroya fekk eisini koyrilin at merkja frá landsstýrismanninum í vinnumálum*

Mynd: Jens Kr. Vang

Bjarni Djurholm langaði ikki bara út eftir Búskaparráðnum á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum. Sjónvarp Føroya fekk eisini koyrilin at merkja frá landsstýrismanninum í vinnumálum.

Landsstýrismaðurin var alt enn nøgdur við mátan, sum Sjónvarpið hevði viðgjørt niðurstøðuna hjá Búskaparráðnum um alivinnuna, har ráðið legði seg undir at hava sovið í tímanum, tá ávaringar frá einari kanning hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í 2000 ikki vóru fylgdar.

- Sjónvarpið hevði gjørt niðurstøðuna, áðrenn innslagið var gjørt. Eg sendi teimum 20 síður, sum greitt vístu uppáhaldinum hjá Búskaparráðnum aftur, og nakað av tí, teir bóru fram var beinleiðis skeivt. Eg skal taka nakað av ábyrgd, men søgan er bara ikki eins einkul, sum Sjónvarpið vildi gera tað til, segði Bjarni Djurholm.

**.páll**

## Enskt longu í triðja flokki

Í kjalarvørrinum av einum lesarabrævi hjá Óla Samró fyri nøkrum mánaðum síðan birtist kjakið um lærugreinin enskt átti at verið tikin framm um danskt í fólkaskúlanum. Nógvar meiningar eru um hetta evnið, og landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, er samdur við teimum, sum halda, at føroysk skúlabørn eiga at fara undir lærugreinina enskt, áðrenn fimta flokki.

- Eg eri samdur við teimum, sum halda, at børnini skulu byrja fyrr at læra enskt. Ein møguleiki kundi verið at latið børnini havt enskt ein tíma um vikuna í 3. flokki og so tveir tímar í fjórða flokki um vikuna, samstundis sum tey framvegis læra danskt á sama støði sum í dag, helt Jógvan á Lakjuni fyri á landsfundinum leygardagin.

**.páll**

## Kallsberg segði kortanei

Hóast samgongusamráðingarnir millum Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin og Fólkaflokkinum gingu skjótt og væl eftir løgtingsvalið 20. januar í ár, so vóru kortini einstakir trupulleikar á vegnum. Á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum greiddi formaður í tingbólki Fólkafloksins, Jørgen Niclasen, frá, at tinglimir Fólkafloksins settu hart ímóti hørðum, og vóru klárir at fara frá samráðingarborðinum, tá bæði Sambandsflokk-inum og Javnaðarflokkurin sýttu Anfinni Kallsberg ein landsstýrissess.

- Vit høvdu allir reist okkum og vóru á veg út úr rúminum, tí vit vildu ikki góðtaka at teir skúgvaðu Anfinn til viks, men Anfinn vildi ikki lova okkum og setti seg fyri hurðina, tí hann helt ikki tað vera rætt at fara frá samráðingarborðinum, segði Jørgen Niclasen.

**.páll**

# Systkinabørn kj

**Systkinabørnini í Fólkaflokkinum, Jógvan á Lakjuni og Rúna Sivertsen, eru rúkandi ósamd í spurninginum um flokkar skulu virka fyri, at fleiri kvinnur gerast virknari í politikki. -Uttan mun um Rúna er mítt sysktinabarn, so eri eg rúkandi ósamdur við henni. Vit skulu ikki blanda okkum í, hvat fólk skulu velja, tí tá gera vit okkum inn á grundleggjandi demokratisk rættindi. Eg haldi tað er langt úti, at vit ikki virða og góðtaka, at fólkið hevur talað og úrslitið varð, at 29 menn og tríggjar kvinnur vóru vald at manna løgtingið, heldur Jógvan á Lakjuni**



LANDSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í kjalarvørrinum av kvinnuskeiðnum "Felags ábyrgd-felag avgerðir", sum varð hildið í september mánaði, var luttakarin hjá Fólkaflokkinum á skeiðnum, Rúna Sivertsen, biðin um at siga nøkur orð um skeiðið á landsfundinum leygardagin.

Innleggið hjá Rúna var rættiliga áhugavert, og tað elvdi til veruligt kjak á landsfundinum. Rúna Sivertsen vísti millum annað á, at tað er ein bági, at kvinnur ikki eru við at taka avgerðirnar, ið verða tiknar í politikki.

- Okkara lív er skipað við lógum úr vøggu í grøv, men kortini vilja kvinnur ikki vera í tí politiska liðnum, har avgerðirnar verða tiknar. Vit liva øll í samfelagnum undir hesum lógum, og tí mugu vit kvinnur eisini vera við at taka hesar avgerðirnar, segði Rúna Sivertsen millum annað.

Hon helt, at Fólkaflokkurin kundi gerast meira virkin í strembanini fyri at fáa fleiri kvinnur virknar í politikki. Rúna segði millum annað, at flokkurin kundi skipa landsfundirnar øðrvísi, so teir gjørdust meira áhugaverdir fyri kvinnurnar. Hetta kundi gerast við at seta evni á dagskránna, sum høvdu áhugan hjá kvinnum.

### Grundleggjandi ósamdur

Eftir innleggið hjá Rúnu Sivertsen tók systkinabarn hennara, Jógvan á Lakjuni, orðið. Landstýrismaðurin í mentamálur var ikki mjúkur. Hann heldur ikki tað er rætt, at politikarar blanda seg í, hvat kyn fólk skulu velja.

- Uttan mun um Rúna er mítt systkinabarn, so eri eg rúkandi ósamdur við henni. Vit skulu ikki blanda okkum í, hvat fólk skulu velja, tí tá gera vit okkum inn á grundleggjandi demokratisk rættindi. Eg haldi tað er langt úti, at vit ikki virða og góðtaka, at fólkið hevur talað og úrslitið varð, at 29 menn og tríggjar kvinnur vóru vald at manna løgtingið, helt Jógvan á Lakj-

# Kunnu ikki lógeva o

**Hvørki fyrrverandi borgarstjórin í Havn ella fyrrverandi løgmaður, Poul Michelsen og Anfinn Kallsberg halda tað er rætt at løggeva fyri at sleppa undan óskilinum í samband við býráðsval í Havn. Báðir vóru samdir um, at trupulleikin kundi loysast við hugburðsbroyting millum býráðslimirnar í høvuðsstaðarkommununi**

LANDSFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað kom valla óvart á nakran á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum leygardagin, at óskilið í samband við býráðsvalið í Havn varð umrøtt á fundinum. Ónøgdin við framferðarháttin hjá Heðini Mortensen í samband við samgongutelvingina í Havn hevur ikki lagt seg enn í Fólkaflokkinum, og hetta kom týðuliga til sjóndar á landsfundinum leygardagin.

### Hugburðsbroyting

Jógvan við Keldu er landsstýrismaður í kommunumálum, og hann hevði lítið gott at bera framferðarháttinum hjá Heðini Mortensen í samband við býráðsvalið í Havn.

- Hatta var bæði óheiðurligt og tað vísir bara, at maðurin hevur onga tygn, helt Jógvan við Keldu.

Landsstýrismaðurin segði seg vera samdan við teimum, sum mettu, at okkurt skuldi gerast í samband við óskilið í Havn, sum nærum er blivin siðvenja seinastu valini, men Jógvan við Keldu hevði einki ítøkiligt boð upp á, hvussu hetta skuldi gerast.